HÁRLASTIK

BINDA

SANDRA SØRENSEN

HÁRLASTIK

Hárlastikið verður bundið rætt – og runt, sum eitt rør. Eitt lastik verður lagt um bundna stykkið, sum at enda verður hekklað saman. Á næstu síðu eru tríggjar uppskriftir upp á hárlastik, við ymsum stokkastøddum og ymsum sløgum av tógvi. Eg tori næstan at siga, at alt tógv og allar stokkastøddir kunnu brúkast, um tú bert finnur rætta talið á eygum.





Fyri at binda hesi hárlastikini skalt tú duga – ella læra teg – at kasta uppá, binda rætt, læsa av og hekkla saman.



Mát: 12 cm í diametur
Bindifastleiki: 23 eygu svara til 10 cm.
Hóskandi stokkar: Rundstokkur 3,5 (40 cm) ella 5 ermastokkar.
Viðmælt tógv: 15 gram av mohair.
Gev gætur, at bundið verður við 2 tráðum.

Kasta 90 eygu uppá stokk 3,5
Bint runt, til arbeiðið er 8 cm.
Læs av.



Mát: 15 cm í diametur
Bindifastleiki: 17 eygu svara til 10 cm.
Hóskandi stokkar: Rundstokkur 5 (40 cm) ella 5 ermastokkar.
Viðmælt tógv: 30 g av Perfect frá Sandnes ella Trio fra Navia.

Kasta 80 eygu uppá stokk 5
Bint runt, til arbeiðið er 12 cm.
Læs av.



Mát: 13 cm í diametur
Bindifastleiki: 10 eygu svara til 10 cm.
Hóskandi stokkar: Rundstokkur 9 (40 cm) ella 5 ermastokkar.
Viðmælt tógv: 15 g av Navia Fípu.

Kasta 50 eygu uppá stokk 9
Bint runt, til arbeiðið er 8 cm.
Læs av.

TILGERÐ – FASTEYGU OG KETUEYGU








Arbeiðið verður hekklað saman við fasteygum.

Vend ranguna út og legg eitt lastik runt um arbeiðið.

Legg arbeiðið saman runt um lastikið soleiðis at kantarnir liggja saman, og rættan vendir úteftir. Set eitt frámerki ígjøgnum báðar síðurnar. Frámerkið heldur arbeiðinum saman, so tú kanst byrja at hekkla fasteygu.



Stikk hekklinálina ígjøgnum tvey eygu á báðum kantunum. Hála ein tráð ígjøgnum arbeiðið við hekklinálini, soleiðis at tú hevur eina bukt á hekklinálini. Vint tráðin runt um hekklinálina og hála ígjøgnum buktina á hekklinálini. Nú hevur tú eitt eyga á hekklinálini.

1. Stikk hekklinálina inn í næstu eyguni
2. Vint tráðin runt um hekklinálina og hála ígjøgnum eyguni, so tvey eygu eru á hekklinálini
3. Vint tráðin runt um hekklinálina og hála ígjøgnum eyguni, soleiðis at tað aftur bara er eitt eyga á hekklinálini

Endurtak hesi trý stigini allan vegin runt. Tað er týdningarmikið at raka eyguni í somu rekkju á báðum kantum, so at arbeiðið ikki verður hekklað skeivt saman.

Seinasta eygað á umfarinum verður hekklað í tað fyrsta fasteygað og læst av við einum ketueyga. Eitt ketueyga er stig 1 og 3.

Fest endar.



BINDA VIÐ PERLUM

At binda við perlum er lættari, enn tað sær út. Tað krevur tó góða tíð, gott tol og eina rúgvu av perlum. Stórar, smáar, plast, glas, træ. Grønar, gular, gull, silvur, ljótar og penar – allar perlur kunnu brúkast! Perlurnar kunnu verða settar saman tilvildarliga, eftir ávísum litum ella eftir mynstri.









VEGLEIÐING

Brúka eina nál, sum er so mikið smøl, at hon passar ígjøgnum holið í perluni, men samstundis hevur nóg stórt nálareyga til, at tógvið passar ígjøgnum.

Koyr umleið 20 perlur á tráðin og flyt tær eftir honum.

Bint perlurnar inn í arbeiðið. Tá ið tú skalt binda eina perlu, hálar tú hana upp og bindur hana inn í arbeiðið. Skumpa tær perlurnar, sum ikki skulu bindast, út eftir tráðnum. Tá ið tú hevur brúkt allar perlurnar, slítir tú tráðin og koyrir nýggjar perlur á.

Perlurnar skulu bindast, so tær liggja á rættuni. Tað eygað, sum perlan er bundin í, skal á næsta umfari bindast snarað, so perlan situr føst.

KASTA UPPÁ OG BINT!

Binda er ætlað øllum, sum vilja læra at binda. Bókin er serliga væl egnað til undirvísing í byrjanardeild og í miðdeild í fólkaskúlanum.

Fyrsti parturin snýr seg um at læra at kasta uppá og at binda. Í øðrum parti eru lættar uppskriftir, og í triðja parti eru hugskot. Aftast er kunning til tann vaksna lesaran um handverkið og um okkara bindisøgu. Aftasti parturin kann verða tikið við í løtupráti, meðan næmingarnir sita við stokkunum.

Binda kann verða lisin úr enda í annan og/ella verða brúkt sum handbók. Myndir, tekningar, stuttar leiðbeiningar og filmar skapa grundarlagið undir læringini, so eftir er bara at kasta uppá – og kasta teg útí.

Góðan bindihug

Sandra

9 789997 223357

BINDA NÁM